UTTANRÍKIS- MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Starv sum skúlastjóri í Fuglafjarðar skúla

**Hevur tú hugsjónir um skúlamenning og áhuga og hegni at átaka tær leiðslustarv í føroyska fólkaskúlanum, so hevur tú møguleika at søkja starvið sum skúlastjóri í Fuglafjarðar skúla**

**Um Fuglafjarðar skúla**
Í Fuglafjarðar skúla ganga 290 næmingar í 1. – 10. flokki. Í skúlanum eru 1 varaskúlastjóri, 28 lærarar og 3 stuðlar í føstum starvi, umframt skrivstovufólk, vaskifólk og húsavarðar. Fuglafjarðar kommuna og Eysturkommuna hava skipað samstarv um 8. – 9. flokk undir heitinum Framvit. Harumframt er 10. floks samstarv, nevnt Enám, við Stranda og Sunda kommunur.

Skúlin fyriskipar ymisk átøk og verkætlanir sum sangleikabreytin og tilboð á tónlistaøkinum við barna- og ungdómskórum í tøttum samstarvi við Fuglafjarðar kvøldskúla.

**Nýggjur skúlabygningur**
Fuglafjarðar kommuna er í holt við at byggja ein nýggjan barnaskúla við heitinum “Meira enn ein skúli”. Talan er um ein samskipaðan skúla-, mentanar- og ítróttarbygning, sum verður tikin í nýtslu skúlaárið 2021-22.

**Um starvið**
Talan er um eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, har tú sum skúlastjóri skalt mynda skúlan og skipa samstarvið við avvarðandi partar. Stjórin virkar í tøttum samstarvi við Uttanríkis- og mentamálaráðið, Undirvísingarstýrið umframt við mentamáladeildina og aðrar deildir í Fuglafjarðar kommunu. Eisini er samstarv við Eysturkommunu og við Stranda og Sunda kommunur.

Skúlastjórin hevur fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans, har høvuðsuppgávurnar eru:

- at standa á odda fyri fakligari og námsfrøðiligari menning og dygd
- at fremja eina mennandi starvsfólkaleiðslu og virka fyri, at lærarar og onnur starvsfólk skúlans hava umstøður fyri fakligari menning
- at virka fyri trivnaði og góðum samstarvi bæði við atliti at næmingum og starvsfólki
- at skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri ávirkan og samábyrgd
- at fremja gott samstarv millum skúla og heim og eggja næmingum og foreldrum
- at fáa sum mest burturúr skúlagongdini fakliga og sosialt
- at skipa fíggjar-, rakstrar-, og málstýring skúlans

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava útbúgving sum fólkaskúlalærari, starvsroyndir í skúlaverkinum og leiðsluroyndir. Tað er ein fyrimunur, at umsøkjari hevur leiðsluútbúgving, og skulu skúlaleiðarar sbrt. § 55 a, stk. 1 í fólkaskúlalógini antin hava tikið ella taka eina góðkenda leiðsluútbúgving.

Persónligar dygdir hjá umsøkjarum eru:

- góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt mennandi leiðslustíl
- vilja og evni at royna nýggjar leiðir
- áhuga fyri avbjóðingum og at átaka sær ein mentanarligan leiklut
- førleika at taka neyðugar avgerðir, sum búgva skúlan til framtíðar tørv og krøv
- góðan málførleika, serliga í føroyskum

**Setanarviðurskifti**
Setanarøkið er undir Uttanríkis- og mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Fuglafjarðar skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum. Starvið er flokkað í lønarflokki 36.1 sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið. Starvið verður sett frá 1. august 2021.

**Umsóknir**
Umsókn saman við avriti av prógvum, C.V. og møguligum viðmælum skal verða Uttanríkis- og mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi **28. mai 2021**.

**Umsóknin verður stílað til:**
Uttanríkis- og mentamálaráðið
Tinghúsvegur 5-7
Postrúm 3279
110 Tórshavn ella við t-posti til ummr@ummr.fo.

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 555044. Upplýsingar um skúlaviðurskifti í Fuglafjarðar kommunu kunnu setast mentanarleiðaranum - Rønn Eliasen, tlf. 238014.

***Uttanríkis- og mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita uttanríkismál, undirvísingarmál, mentan og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum og frítíðarvirksemi.*